# Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð
# Bygdarráðsfundur tann 18. november 2009, kl. $20^{00}$

**Bygdarráðslimir á fundi:** Karl A. Olsen, Herit Magnussen, Pauli T. Petersen, Jón Mikkelsen Evelyn Gaard, Siri S. Niclassen og Bárður Poulsen
**Skrivari:** Maud Poulsen

---

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 55**
Treytir fyri røktarheimsbygging
Borgarstjórin mælir til at ganga treytunum frá Fíggjarmálaráðnum á møti.

**Viðv. 55**
Tilmælið einmælt samtykt.

**Mál 56**
2. viðgerð av uppskoti til endurskoðaða fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2009.
J.nr. 2005-720
Tilmæli frá fíggjarnevndini um at samtykkja uppskotið til endurskoðaða fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2009.

**Viðv. 56**
Tilmælið einmælt samtykt.

**Mál 57**
2. viðgerð av uppskoti til fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2010.
J.nr. 2009-176
Tilmæli frá fíggjarnevndini um at samtykkja uppskotið til fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2010 og at áseta kommunuskattaprosentið fyri 2010 til 23%.

**Viðv. 57**
Í sambandi við 2. viðgerð av fíggjarætlanini mælir Trivnaðarnevndin til, at foreldragjaldið fyri barnaansing verður óbroytt kr. 1.800 fyri Gjáarlon, og at gjaldið fyri frítíðaransing verður kr. 1.100, tvs. at farið verður burtur frá frítíðaransing hálvari tíð.

Pauli T. Petersen setti fram broytingaruppskot um, at foreldragjaldið verður óbroytt í mun til 2009.
Tilmælið hjá Paula T. Petersen einmælt samtykt.

Tilmælið um at samtykkja uppskotið til fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2010 og at áseta kommunuskattaprosentið fyri 2010 til 23% einmælt samtykt.

# Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð
# Bygdarráðsfundur tann 18. november 2009, kl. $20^{00}$

**Bygdarráðslimir á fundi:** Karl A. Olsen, Herit Magnussen, Pauli T. Petersen, Jón Mikkelsen Evelyn Gaard, Siri S. Niclassen og Bárður Poulsen

**Skrivari:** Maud Poulsen

---

**Mál 58**
Fráboðan til Innlendismálaráðið og Løgtingið um kommunusamanlegging.

**Viðv. 58**
Einmælt samtykt at senda fráboðan um kommunusamanlegging til Innlendismálaráðið og Løgtingið.

**Mál 59**
Staðfesting av vali av varalimum til kommunalar nevndir.

**Viðv. 59**
Tilmælið einmælt samtykt.

Bókin lisin. Fundur lokin kl. 21.30.

Sign.:

Karl A. Olsen Herit Magnussen Pauli T. Petersen Jón Mikkelsen

Evelyn Gaard Siri S. Niclassen Bárður Poulsen